## Haitisk børn til USA

Amerikanska stjórnin sigur nú, at børn, sum hava mist foreldrini í jarðskjálvtanum í Haiti, kunnu fáa ta neyðugu hjálpina í USA. Tilboðið kom frá amerikanska trygdarráðharranum, Janet Napolitano, í gjárkvøldið. Hon segði, at USA leggur dent á, at fólk verða verandi í Haiti, men at foreldraleys børn har kunnu ættleiðast til USA og fáa uppihaldsloyvi. Janet Napolitano segði, at amerikonsku myndugleikarnir fara at taka støðu í hvørjum einstøkum føri, og at myndugleikarnir í Haiti skulu vátta, at barnið hevur mist síni næstu, áðrenn tað kann ættleiðast til USA.



## Ójavni í Evropa

Livikorini hjá fólki í Evropasamveldinum eru sera ymisk. Tøl hjá samveldinum vísa, at í 2008 høvdu 17 prosent av fólkinum minni enn tað almenna fátækramarkið at liva fyri. Tað var serliga í Letlandi og Rumenia, at livikorini vóru niðan fyri fátækramarkið, og støðan er neyvan batnað síðani, tí júst hesi bæði londini eru meint rakt av altjóða fíggjarkreppuni, skrivar AP. ES setir fátækramarkið soleiðis, at tey, sum forvinna minni enn 60 prosent av meðalinntøkuni í teirra egna landi, liva undir fátækramarkinum. Í letlandi vóru 26 prosent undir markinum og í Rumenia 23 prosent.

# Stavifeilir oyðileggja trúvirðið

**Stavifeilir skera ikki bara í eyguni; teir oyðileggja eisini trúvirðið í sjálvt tí besta skrivinum ella brævinum, sigur Jonhard Mikkelsen, cand. mag og lærari, sum nú aftur bjóðar fólki møguleikan at fáa føroysku stavingina á beint**

MÁL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Dugir tú ikki at stava, skalt tú ikki ganga út frá, at fólk taka tíni brøv ella skriv í álvara. Ein beiskur sannleiki kanska, men vón er fyri sjálvt teimum, sum mest sum hava givið upp at læra at stava føroyskt.

Gevur tú tær stundir at seta seks kvøld av tvær vikur í februar mánaði, fært tú nú møguleikan at rudda upp í mest vanligu stavifeilunum.

Tað er Jonhard Mikkelsen, cand. mag, sum bjóðar fram skeið í føroyskari stavseting, ið byggir á royndir frá eini skeiðsrøð í heyst í fjør á Føroya læraraskúla. Millum 80 og 100 fólk vóru á hvørjum skeiði, sum vardi í fimm dagar 4-5 tímar hvønn dagin. Jonhard Mikkelsen stjórnaði undirvísingini, og hjálparlærarar fóru ígjøgnum venjingarnar saman við hvør sínum 10 skeiðsluttakarum. Úrslitið var, at meginparturin av skeiðsluttakarunum høvdu beint fyri teimum flestu og grefligastu stavivillunum, tá ið fimm dagar vóru umlidnir.

### Stimbrar sjálvsálitið

Jonhard Mikkelsen minnir á, at tá ið tú skalt samskifta nógv skrivliga, til dømis á almennari skrivstovu, banka og aðra staðni, er tað ómetaliga óheppið, um brøvini, tú sendir fólki, skríða skørp í villum.

- Fólk, ið duga at stava, síggja fyrst feilirnar, áðrenn tey lesa innihaldið. Stavivillur oyðileggja sjálvt tað besta brævið. Ikki bara hakar tað í eyguni, men tað oyðileggur trúvirðið í tí, ið sagt verður. Tann góði boðskapurin, tað góða innihaldið fer ofta fyri skeyti, tí móttakarin situr bara og illneitast inná, hvussu óhjálpið brævið er, sigur Jonhard Mikkelsen.

Av somu orsøk aftra fólk seg mangan at senda øðrum tekst at lesa, tí tað skert ikki burtur, at tað er eitt sindur pínligt at senda fólki tekst, sum er fullur av stavivillum. Almennir stovnar kunnu ikki loyva sær tað, tað er eitt, og hjá stórum virkjum gongur tað út yvir sjálvsmyndina. Ikki at rætta tekst, áðrenn hann verður sendur úr húsunum, kann geva ógvuliga óhepnan bakslátt. Hinvegin - at duga stavseting er gott fyri sjálvsálitið, og tað ger fólk tryggari, tá ið tey skulu gera vart við sínar hugsanir, vísir Jonhard Mikkelsen á

### Tørvur skapar motivation

Hann leggur afturat, at motivation, sum er ein avgerandi partur fyri at læra nakað, kemur ofta fram í sambandi við slík størv

–Tá ið tørvurin á rættskriving ger vart við seg, læra fólk tað. Alt frættist, og tey, ið hava verið á skeiði, hava sjálvandi borið tíðindini út um allar geilar. Nú havi eg so fingið fyrispurningar, um tað hevði borið til at fingið skeiðið endurtikið sum kvøldskeið fyri fólk, sum fegin vilja duga betur at stava, sigur Jonhard Mikkelsen.

Enn dugir hann ikki at siga, hvussu stórur tørvurin er, men nýggja skeiðið verður lagt til rættis eftir teimum, ið koma á skeið. 8-12 fólk er nóg mikið til ein flokk. Verða tey fleiri, verða tey fleiri lærarar.

- Undir øll umstøðum byrja vit frá botni. Eingin skal smæðast. Vit ganga út frá, at fólk, sum koma til okkara, duga ikki at stava, tí koma tey til okkara. Bara tí. Og tað merkir, at eingin skal kenna seg illa.

### Mýtir um føroyskt

Jonhard Mikkelsen viðgongur, at føroyskt er torført mál at stava rætt, og tað er einki dulsmál, at nógv eru ikki so stinn í at stava rætt. So mikið viðurkenna vit øll, men føroyskt er ikki truplari enn onnur mál, heldur hann. Og tí eru okkara trupulleikar ikki størri enn teir, ið onnur mál dragast við.

- Siga nóg nógv, sum av onkrari grund hava lært stavsetingina illa, at hetta er torført og trupult ella ógjørligt, so hevur tú skapt eina mýtu, sum er ring at mana aftur í jørðina. Eitt stórt fylgi fer jú ikki skeivt – ikki sannheit?, staðfestir Jonhard Mikkelsen speiskliga, men minnir á, at tað er framvegis bara ein mýta – ein mýta sum livir sítt fríska lív.

Veruleikin er tann, at føroysk stavseting kann saktans lærast skjótt og lættliga og enntá stuttliga eins og alt annað her í verðini. Tað er bara spurningur um pedagogikk. Føroysk stavseting setur síni krøv til skrivaran. Einki at ivast í tí, men tað er einki galið við stavsetingini sjálvari.

- Tað kann vera galið við pedagogikkinum, arbeiðsháttinum, frálæruni, lærarunum. Møguliga hava fólk ikki verið motiverað at læra tað, tá ið tað var á skránni. Orsøkirnar kunnu verða nógvar, men truplari er tað ikki enn so, at øll, ið vilja læra at stava føroyskt, læra tað, vissar Jonhard Mikkelsen um.

Til ber at melda seg til skeiðið á www.sprotin.fo.



*- Fólk, ið duga at stava, síggja fyrst feilirnar, og tí fer góða innihaldið í illa skrivaðum tekstum ofta fyri skeyti, áðrenn tað yvirhøvur verður lisið, sigur Jonhard Mikklesen, lærari í føroyskum*


**Røktarheim á Grønanesi í Vestmanna**
Undangóðkenning av høvuðsarbeiðstøku

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi á Grønanesi í Vestmanna verður við hesum boðið til undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð upp á høvuðsarbeiðstøku.

**Verkætlanin:**
Nýggja røktarheimið verður tilsamans 2046 bruttofermetrar, íroknað kjallara. Pláss verður fyri tilsamans 24 búfólkum, harav verður serdeild fyri minnisveik. Á røktarheiminum verður eisini stórkøkur, ið kann veita mat til røktarheimið og heimarøktina í økinum.

Vega- og byggibúningararbeiðið er farið í útboð. Ætlanin er at byrja sjálvt byggiarbeiðið í summar.

**Høvuðsarbeiðstøkan:**
Høvuðsarbeiðstøkan skal fevna um allar fakarbeiðstøkur í sambandi við bygging av røktarheiminum. Fakarbeiðstøkurnar eru:

- Jørðarbeiði
- Kloakkarbeiði
- Betongarbeiði
- Timburarbeiði
- Málaraarbeiði
- HVS-arbeiði
- El-arbeiði
- Stálarbeiði
- Snikkaraarbeiði
- Gólvlegging
- Ventilatiónsarbeiði
- Lendisarbeiði

**Treytir:**
Áhugaðir høvuðsarbeiðstakarar fáa meira at vita um kravdar upplýsingar, treytir o.a. á heimasíðuni hjá Vestmanna Kommunu www.vestmanna.fo. Fylg leinkjuni »Undangóðkenning av arbeiðstakarum at geva tilboð upp á bygging av røktarheimi«.

**Freist:**
Áheitan um undangóðkenning skal sendast til Selmar Nielsen Arkitektur Spf, Landavegi 9, Tórshavn, og vera okkum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 3. februar 2010.**

Eru spurningar, ber til at ringja til Jóhan Syderbø, prosjekteringsleiðara, á tlf. 354812 ella 210818.

**Ráðgevarar:**
Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f
Pf. Sofus M. Jakobsen Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.
LBF Ráðgevandi verkfrøðingar
SP/F KJ ELRÁÐ Ráðgevandi verkfrøðingar

Sosialurin / KsR 34 18 00